

## Pál Joensen fingið gullnál

Vetrar FM í svimjing hevur verið um vikuskiftið. Fleiri svimjarar úr Tvøroyrar og Vágs Svimjifelag, sum nú venja saman, fingu heiðursmerkir, men ein skaraði tó framúr.

Pál Joensen fekk nevniliga gullnál og hann er 17. føroyingur, ið klárar hetta bragd. Nálatíðirnar eru nevniliga nakað heilt fyri seg og nógv betri enn met-tíðirnar.

Fyrsti føroyingurin fekk gullnál í 1975 og Pál er tan 17. í røðini.

Hann fekk nálina fyri tíð sína í 400 metur crawl har hann hevði tíðina 4.02.78.

Tá svimjararnir komu til Vágs sunnukvøldið var móttøka fyri nálavinnararnum Pál og hinum, ið fingu heiðrsmerkir.

Móttøkan var í svimjihøllini í Vági og Pál og svimjararnir annars vistu av ongum. Heri Mortensen, fyrrverandi formaður í svimjifelagnum í Vági og svimjari í fremstu røð, helt røðu. Eisini Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, helt røðu og handaði vegna Vágs Kommunu Pál gávu.

# Rundaði tey 20 í stórum stíli

**Sir Alex Ferguson er væl og virðiliga tann venjarin, sum hevur sitið longst í sama felag í dagsins Premier League. Samstuindis hevur hann í 20 ár vunnið sær status sum tann í serflokki mest vinnandi venjarin í Onglandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dag er eingin ivi um, hvør er mest vinnandi venjarin í enskum fótbólti. Í øllum førum, tá tosað verður um teir, sum enn eru aktivir.

Sir Alex Ferguson hevur vunnið alt tað, sum kann vinnast saman við Manchester United, og flestu av steypunum hevur hann eisini vunið fleiri ferðir.

### Mundi fingið sekkin

Men tað var tó nær við, at allir sigrarnir vórðu av ongum, longu áðrenn tað byrjaði. Ferguson hevði longu skapt sær eitt navn við´framúr úrslitum í Skotlandi, men tað var ikki bara gott, tá hann í november mánaði í 1986 tók við sum venjari í Manchester United. Og atfinningarnar vóru fleiri, tá hann alt fyri eitt ruddaði upp í gomlu garduni. Fyrst og fremst, so helt prinsippfasti skotin, at talan var um ov nógv ballarí í hópinum. Menn sum Paul McGrath og Norman Whiteside vóru bert tveir av teimum, sum undir Ron Atkinson vórðu mettar sum hetjur, men sum fingið sekkin frá Ferguson.

Ístaðin vórðu spælarar sum Dennis Irwin, Brian McClair og Gary Pallister keyptir, men úrslitini lótu tó bíða.

Og í 1990 stóð heilt illa til. Manchester United var í skeiva endanum av stigatalvuni, og tá triða umfarið í FA-Cup stóð á skránni, var breið semja í miðlunum um, at hetta kundi verða seinasti dysturin hjá Ferguson við stýrisvølin. Eini boð, sum nevndin í felagnum tó tíðum hevur avsannað síðani, men tað er greitt, at trýstið var øgiligt. Og at Manchester United ikki hevði góðtikið støðuna, um hon ikki betraðist.

Men tað er – sum maðurin segði – ein hypotetiskur spurningur. Manchester United vann dystin móti Nottingham Forest endaði við 1-0 sigri til reyðu devlarnar, og síðani hugdu teir ikki aftur. Árið endaði við FA-Cup sigri í finaluni móti Crystal Palaece, og so hevði Fergie fingið



*Seinastu 30 árini hevur Feruson vunnið í alt 36 steyp sum venjari. Av hesum eru tey 27 komin til høldar gjøgnum 20 ár í Manchester United. Men enn tykist hungurin eftir at vinna at vera púrasta óskerdur*

*Mynd: Scanpix*

fyrsta steypið. Tað næsta kom árið eftir í europisku steypavinnarakappingini, og hóast Leeds akkurát snikti seg framum ta ferðina, so var greitt, at ein nýggj stórtíð var ávegis hjá felagnum.

Og við Eric Cantona, sum kom til á heysti 1993 úr júst Leeds, fann Ferguson rætta frymilin. Manchester United varð nú dominerandi kraftin í enskum fótbólti øll 90'ini. Minniliga treble-árið var ivaleyst hæddarpunktið, men hartil var talan um so nógvar heiðrar. Eitt nú hevur Manchester United sum einasta enska felagið vunnið tríggjar greipur, og Alex Ferguson er einasti venjarin, sum trý ár á rað hevur lyft meistarasteypið.

### Triðja liðið

Stutt inni í nýggju øldini boðaði Alex Fergusen – sum nú hevði fingið eitt Sir afturat navninum – frá, at hann fór at gevast sum venjari á sumri 2002. Hetta tóktist eisini merkja spælarahópin, og kappingarárið 2001/2002 spældi Manchester United nakað undir miðal. Sjálvur tók venjari sín part av ábyrgdini, og eftir at hava umhugsað støðuna gjørdi hann av, at hann kortini ikki vildi gevast.

Ístaðin fór hann undir tað, sum hann annars alla tíðina hevði sagt seg ikki megnað, tá sammett var við Matt Busby, sum fram til Fergie varð mettur sum størsti venjarin í søguni hjá felagnu. Nevnliga at byggja sær eitt nýtt stórlið á triðja sinni.

Við monnum sum Robsons, Pallister. Bruce, Cantona og Schmeichel hevði Ferguson annars enda 26 ára bíðitíðini hjá felagnum eftir meistaraheitinum. Beckham, Scholes, Keanee, Stam og aðrir vóru hornasteinarnir undir næsta liðnum. Og við Ronaldo, Rooney, Saha og Ferdinan tykist Ferguson nú ávegis triða liðnum. Enn hevur hetta ikki vunnið meistaraheitið, men sigurin leygardagin saman við tapinum hjá Chelsea sunnudagin hevur fyribils lagt Manchester United á odda í Premier League.

### Ungdómsarbeiðið og sinnið

Hóast Sir Alex soleiðis hevur verið stóri felagsnevnarin í nýggju stórheitstíðini hjá Manchester United, so eru eisini spælarar, sum hava verið serstakliga drúgvir og trúgvir. Ikki minst man hetta vera úrslit av sterka ungdómsarbeiðinum, sum venjarin alt fyri eitt legði lunnar undir. Fremstur av øllum stendur Ryan Giggs, sum síðani 1990/91 hevur verið fastur partur av liðnum. Aðrir trúgvir stuðlar hava verið og eru menn sum Gary Neville og Paul Scholes.

Hesir teljast millum teir fáu, sum hava »yvirlivað« sterka sinnalagið hjá skotanum við stýrisvølin. Ferð eftir ferð hava áskoðarar rist høvdið, tá stórstjørnur eru seldar, tá hesir ikki longur aktaðu venjaran í einum og øllum. Seinasta dømið um hetta var Ruud van Nistelrooy, sum nú spælir í Real Madrid. Onnur nøvn, sum eru farin eftir sama leisti, eru Paul Ince, David Beckham og Jaap Stam, og tað var eisini nær við, at listin umfataði Peter Schmeichel. Hann og venjarin høvdu nevnliga á sinni eitt øgiligt skeldarí, men báðir samdust teir tó um at samstarva heldur enn at stríðast, og tað man vera ein avgerð, sum hvørgin teirra hevði orsøk at angra.

## Rósur frá Wenger

Tveir venjarar, sum tíðum hava verið í almennum hornatøkum, eru Alex Ferguson og Arsene Wenger, ið er maðurin handan framúr úrslitini hjá Arsenal seinastu 10 árini.

Mangan hevur orðadrátturin verið sera harður, men hetta forðaði tó ikki Wenger í at rósa Ferguson, nú hesin fór um tey 20 árini í venjarasessinum.

- Hvør vil ikki vera tann besti? Tað er nakað, sum ein og hvør venjari hevur hug til, men í løtuni er tað Ferguson, sum eigur hendan heiðurin.

- Sjálvandi er trupult at sammeta avrikini hjá ymsu venjarunum. Og tað er munur á tí, sum Clough gjørdi í Nottingham Forest og tí, sum Ferguson hevur gjørt í Manchester United. Ella tí, sum Bob Paisley gjørdi í Liverpool.

- Men samanlagt hevur eingin gjørt tað betri enn Ferguson. Tað er merkisvert, at ein venjari í so drúgt áramál hevur megnað at halda motivatiónini hjá bæði sær og liðnum. Og samstundis hevur hann handfarið stressið og alt annað, sum fylgir við, tá tú venjari á somikið høgum støði.

## FAKTA

### Sir Alex Ferguson

**Føddur:** 31. desember 1941
**Feløg sum spælari:** Stranraer. St. Johnstone, Dunfermline, Glasgow Rangers, Falkirk, Ayr United
**Feløg sum venjari:** East Stirling, St. Mirren, Aberdeen, Manchester United

**Steypaskáp:**
**Skotska Premiership:** 3 (1980, 1984, 1985)
**Skotska 1. deild:** 1 (1977)
**Skotska FA-Cup:** 4 (1982, 1983, 1984, 1986)
**Skotska Liga-Cup:** 1 (1986)
**Enska Premiership:** 8 (1993, 1994, 1996, 1997, 1999, 2000, 2001, 2003)
**Enska FA-Cup:** 5 (1990, 1994, 1996, 1999, 2004)
**Enska Liga-Cup:** 2 (1992, 2006)
**Enska Charity Shield:** 6 (1990, 1993, 1994, 1996, 1997, 2003)
**UEFA Champions League:** 1 (1999)
**Europa Cup fyri steypavinnarar:** 2 (1983, 1991)
**Europiska Super-Cup:** 2 (1983, 1991)
**Inter-Continental Cup:** 1 (1999)